## Nýggj vindeygu frá Bill

Microsoft við Bill Gates hevur meldað út, at nýggja útgávan av Windows skal verða klár um tvey ár. Hetta skrivar Morgenavisen Jyllands-Posten.

Bill Gates sigur, at nýggja Windows stýriskipanin verður slóðbrótandi - sum eitt »Big Bang.«

Men tað hevur verið trupult at koma á mál við nýggju stýriskipanini, sum enn ikki er liðug. Teir stóru trupulleikarnir hava gjørt, at Microsoft nú hevur lækka ambitiónsstøðið eitt sindur við tað, at sokallaða Microsoft File System ikki verður við á hesum sinni. Hetta er eitt forrit, sum heldur skil á fílunum í Windows.

Tvey ár er tó ein long tíð at bíða eftir nýggjum vindeygum, og inntil tá fer Windows at bjóða sínum brúkarum eina størri dagføring av stýriskipanini Windows XP. Morgenavisen Jyllands-Posten skrivar týsdagin, at hetta verður gjørt einaferð í september.

## Hann ákærir hini

Fyrrverandi forsetin í Jugoslavia, Slobodan Milosevic, helt í gjár sína verjurøða í rættinum í Haag. Hann byrjaði við at siga, at ákærurnar móti honum er tann reina lygn. Hann legði afturat, at tað var altjóða samfelagið, sum oyðilegði Jugoslavia. Hetta skrivar BT týsdagin.

**-hkm**

# Vit mugu sjálvi skapa framtíðina



*Tað er ikki nakað nýtt, at framtíðin kemur. Men spurningurin er, um vit bara lata hana koma, ella um vit fyrireika okkum til hana, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa*

*Mynd: Jan Müller*

**– Tað er ikki nakað nýtt, at framtíðin kemur. Men spurningurin er, um vit bara lata hana koma, ella um vit fyrireika okkum til hana. Tað nyttar ikki bara at tosa um, at undirsjóvartunnilin hevur stóran týdning fyri Klaksvík, tað er væl og virðiliga staðfest. Nú ræður um at taka nakrar avgerðir og so at handla út frá teimum, sigur stjórin í Norðoya Sparikassa, Eyðfinn Reyðberg**

TUNNILSPRÁT
*Solby A. Eliaesen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Tosað verður dúgliga um Klaksvík verður tilreiðar til tað fasta sambandið við meginlandið, sum í dag ikki liggur nógv meira enn hálvt annað ár frammi í tíðini. Nógvar røddir eru frammi, sum siga, at tað verður eitt slag av einum mønustingi fyri bæði handils- og býarlívið, tí hesi fara ikki at megna at standa kappingini kurl.

Hesum er sparikassastjórin, Eyðfinn Reyðberg, tó ikki heilt samdur í. Hann heldur, at tað er av alstórum týdningi at norðoyingar gera sær greitt, at gerðir skulu til og ikki bara tos um, hvørjir vansar eru við tunlinum.

– Tað nyttar lítið at seta ljóskastaran á tað, at handlar lata aftur í býnum, tí harvið verður gloymt, at aðrir samstundis lata upp, vísir Eyðfinn á.

Samstundis væntar hann eisini, at hendan gongdin við, at handlar lata aftur, fer at halda fram, men tað sær hann ikki svart uppá.

– Eiga vit ikki nógv heldur at royna at hava nógvar sterkar og stórar handlar ella fyritøkur við einum høgum tænastustøði frammum at hava eina ørgrynnu av smáum, sum nóg illa hóra undan. Og hartil ikki kunnu loyva sær nakað serligt orsakað av fíggjarstøðuni, spyr hann. Og leggur samstundis dent á, at við undirsjóvartunlinum harðnar kappingin øgiliga nógv, og tí verður marknaðarføring ein rættiliga avgerandi partur av handilslívinum – serliga eftir at tunnilin er tikin í nýtslu.

Eyðfinn vísir á, at viðskiftafólk eru kræsin í dag, og tey finna seg so sanniliga ikki í, at tey ikki fáa ta vøruna ella tænastuna, sum tey ynskja.

– So fara tey bara onkra aðrastaðni, har tey kunnu fáa hana, sigur hann.

### Ikki evstamark

Eyðfinn vísir á, at tað kann tykjast sum, at nógvir klaksvíkingar síggja dagin, tá tunnilin letur upp, sum eitt evstamark fyri, at alt skal verða klárt. Men tað heldur hann ikki.

– Har er als ikki talan um nakra dead-line. Men týdningarmikið er, at avgerðirnar verða tiknar nú, og at ítøkiligar framtíðarætlanir til ta tíð liggja fyri framman. Ongin sigur, at alt skal verða liðugt samstundis, sum tunnlin letur upp, staðfestir hann.

Hetta førir tosið inn á ætlaðu handilsmiðstøðina á Sandinum, sum tykist at hanga í ógvuligari leysari luft.

– Ja, tað ljóðar, at handilsmiðstøðin ikki verður til nakað. Um tað verður so, so taki eg synd í býnum, tí ein handilsmiðstøð hevði lyft allan býin upp á eitt hægri støði og hevði havt ávirkan á alt, sigur hann. Her hugsar hann serliga um sethúsaprísir, trivnaðin, hvar fólk velja at búseta seg og so framvegis.

Eyðfinn skilir ikki, at handilsfólk føra fram, at ein handilsmiðstøð hevði tikið alt grundarlagið undan handilslívinum í Klaksvík.

Hann heldur tað er sera umráðandi, at fólk byrja at hugsa um, at tað í veruleikanum ikki er hvønnannan, sum tey kappast við. Men tey, sum eru uttanfyri. Tað vil siga meginøkið.

– Vit hava verið so avbyrgd í langa tíð, at tey, sum eru uttanfyri eru voksin, og vit í roynd og veru minkað. Nú er tíð uppá, at tað gongur upp fyri okkum, at tað er kappingina uttanfyri, sum vit skulu hugsa um. Eg haldi eisini, at tað er við at henda, sigur Eyðfinn Reyðberg.

### Prísur avgerandi

Eitt annað, sum Eyðfinn heldur fer at spæla rættiliga stóran leiklut í, hvussu framtíðin fer at verða, eftir at tunnilin er latin upp, er prísurin fyri at koyra ígjøgnum hann.

– Hann má í øllum førum ikki vera hægri enn tann í Vágatunlinum í dag. Tað er púra vist, sigur hann.

Somuleiðis nevnir hann, at um so er, at stór tiltøk eru í Klaksvík, til dømis Summarfestivalurin, ítróttarnátt ella Open by Night, at so átti tað at borið til at havt eitt samstarv millum Norðoyatunnilin og tey, ið skipa fyri, soleiðis, at fólk kundu koyrt bíligari í gjøgnum tunnilin í tí sambandinum.

Hetta heldur sparikassastjórin hevði gagnað øllum pørtum.

– Tað sigur seg sjálvt. Fleiri bilar høvdu ivaleyst koyrt gjøgnum tunnilin og meira fólk høvdu vitjað tiltøkini, slær hann fast.

Eyðfinn Reyðberg sær fyri sær ein fullkomuliga broyttan bý, tá fasta sambandið er veruleiki. Men hann er ikki í iva um, at norðoyingar mugu standa saman og samstarva um at skapa ta framtíðina, sum liggur so nær.

### 138 metrar upp á eina viku

Sambært heimasíðuni hjá Norðoyatunlinum vórðu 138 metrar boraðir í síðstu viku. 77 metrar Borðoyarmegin og 61 metrar Leirvíksmegin. Sostatt eru nú sprongdir 1.549 metrar inn Leirvíksmegin og 841 metrar Klaksvíksmegin - ella 2.390 metrar samanlagt.

**- sae -**



# Kollafjord Pelagic virkar endiliga fisk

**Mánakvøldið kom nótaskipið Finnur Fríði á Kollafjørð við eini last av norðhavssild, sum skal virkast til matna og sendast á eysturevropeiska marknaðin**

FISKIVINNA
*Stefan í Skorini*

Endiliga ein sólskinssøga í føroyska vinnulívinum. Kollafjord Pelagic hevur nú fingið veruliga gongd á virksemið, og mánakvøldið landaði Finnur Fríði 400 tons av sild. Tvær vaktir við fimtan tímaløntum á hvørjari vakt eru til arbeiðis á virkinum, og arbeitt varð við fullari ferð mánanáttina og týsdagin. Umframt tey tímaløntu eru átta fastlønt fólk á virkinum.

– Hetta er fyrsta veruliga lastin, vit hava fingið síðan umbyggingina og royndarkoyringina, sum var í mars mánað í ár, sigur Sofus Poulsen, stjóri á Kollafjord Pelagic, sum nú er klárt at taka ímóti og virka fisk.



*Finnur Fríði landaði á Kollafjord Pelagic mánakvøldið. Hetta var fyrsta lastin, sum virkið tekur ímóti, og nú brynjar tað seg til makrelsesongina í vetur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Málið er 40.000 tons

Tá virkið framleiðir optimalt, og øll viðurskifti eru til vildar, skuldi virkið kunna virkað eini 30-40.000 tons um árið.

– Hetta er málið hjá okkum. Tað verður ikki í ár og neyvan komandi ár, men tá vit hava fingið framleiðsluna í eina fasta legu, rokna vit við at virka umleið 30-40.000 tons um árið, sigur Sofus Poulsen, stjóri.

– Ætlanin er at fáa teir flestu føroysku bátarnar at landa hjá Kollafjord Pelagic, men neyðugt verður eisini at fáa lastir frá írskum, skotskum og norskum bátum, sigur stjórin um framtíðarvirksemið hjá virkinum.

Nú stendur makrelsesongin fyri framman, og tá ætlar Kollafjord Pelagic sær at vera við frá byrjan av. Sildasesongin er um at vera liðug, og makrelsesongin er frá september til mánaðarskiftið januar/februar.

– Okkara høvuðsvirksemið verður um heystið og um veturin. Summarið verður væntandi lágsesong hjá okkum. Tá fara vit møguliga at taka ímóti gulllaksi og sild, men tað verður fyrst og fremst makrelurin, ið vit satsa uppá, greiðir Sofus Poulsen frá.

Fiskurin verður fyrst støddarskildur og síðani pakkaður í 20 kilo eskjur. Tann virkaði fiskurin verður goymdur á frystigoymsluni hjá Kloosterboer í Kollafirði, sum teir upprunaligu eigararnir av Kollafjord Pelagic framvegis eiga, og ætlanin er at selja fiskin á tí eysturevropeiska og russiska marknaðinum.

### Byrjunartrupulleikar

Fyri einum ári síðani keypti eitt samtak millum Føroya Sparikassa, Framtaksfelagið Notio, Tryggingarfelagið Føroyar og reiðaríini hjá fleiri nótabátum í Gøtu (Finnur Fríði, Tróndur í Gøtu, Jupiter og Høgaberg) virkið í Kollafirði, men ikki fyrr enn nú er virksemið veruliga komið í gongd.

Tað vóru upprunaliga hollendskir íleggjarar, ið bygdu virkið í Kollafirði, men fyri einum ári síðani valdu teir at taka seg úr Kollafjord Pelagic og selja til føroyingar. Fyrsti spakin varð settur í í 2001 og virkið stóð liðugt í 2002, og nú tvey ár seinni verður fiskur loksins virkaður á Kollafjord Pelagic.

– Vit hava havt nakrar byrjunartrupulleikar. Eitt nú skuldi ein nýggjur frystitunnil vera klár í januar, men hann bleiv ikki klárur til nýtslu fyrr enn í mars mánaði, og tað var sesongin fyri makrel av á hesum sinni, og tískil hava vit verið nakað seinkaðir, sigur Sofus Poulsen.

Síðani í vár hava ymisk viðurskifti havt við sær, at virkið ikki hevur fingið tann neyðuga fiskin at virka. T.d. hevur góðskan á rávøruni (sildini) ikki verið nóg góð eitt skifti í summar.

# Eimskip riggar av í Føroyum

**25 fólk eru søgd úr starvi hjá Eimskip í Føroyum. – Samanleggingin millum Eimskip og Skipafelagið krevur rationaliseringar, sigur Brynjar Viggóson, stjóri á Eimskip í Føroyum**

UPPSAGNIR
*Stefan í Skorini*

Av teimum 25 fólkunum, ið hava starvast hjá Eimskip, hevur umleið ein triðingur fingið at vita, at tey kunnu halda fram hjá Skipafelagnum. Vit frætta, at átta av starvsfólkunum hava fingið starv aftur á Skipafelagnum.

– Orsøkin til uppsagnirnar er fyrst og fremst, at samanleggingin krevur, at vit ikki hava nakrar dupultfunktiónir, sigur Brynjar Viggóson, ið leggur afturat, at hetta var torførasta uppgávan, hann hevur havt sum stjóri hjá Eimskip í Føroyum. Eitt starv hann hevur røkt í eitt ár.




*Eimskip í Føroyum riggar av eftir samanleggingina við Skipafelagið Føroyar, og her verður skeltið á nýggja bygninginum hjá Eimskip á Skansabryggjuni tikið niður*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Hetta er beinleiðis orsøkin til uppsagnirnar, men um vit hyggja eftir heildarmyndini, kunnu vit staðfesta, at virksemið hjá báðum feløgum hevur verið minkandi, og hetta hevur kravt eina samanlegging. Á tann hátt kann tað sama flutningsvirksemið rekast munandi bíligari enn áður.

### Kundin má ikki svíða

Spurningurin er síðani, um hendan samanleggingin ikki fer at fáa negativar avleiðingar fyri kundarnar hjá flutningsfyritøkunum.

– Eg rokni ikki við, at kundin fer at líða undir hesi samanleggingini, og tað má fyri alt í verðini ikki henda. Skipafelagið verður effektivar í sínum virksemi, og tað rokni eg við, at kundin fer at kenna ágóðan av, sigur stjórin á Eimskip í Føroyum.

Men vísir tað seg ikki ofta, at jú færri veitarar eru á marknaðinum, tess verri verður tænastan?

– Vit skulu minnast til, at hetta er ein opin marknaður, og tí ber tað ikki til hjá Skipafelagnum at hugsa, at nú vit eru einsamallir nýtist okkum ikki at veita eins góða tænastu, tí so tapa teir í longdini, sigur Brynjar Viggóson, ið heldur fram sum prosjektleiðari í Eimskip, inntil samanleggingin er framd til fulnar.

Hann leggur afturat, at felagið fer at kanna møguleikarnar fyri at bjóða onkrum av starvsfólkunum starv á skrivstovunum hjá Eimskip í øðrum londum.

Starvsfólkini eru uppsøgd frá 1. september, og tey flestu hava eina uppsagnartíð á 3-6 mánaðir.

Á portalinum mánadagin stóð at lesa, at ongar uppsagnir verða á Skipafelagnum Føroyar orsakað av hesi samanleggingini. Tó verða væntandi nakrar umleggingar framdar á Skipafelagnum, men júst hvussu hesar fara at merkjast hjá starvsfólkinum er ógreitt.

– Vit hava ongar ætlanir um uppsagnir, sum eru beinleiðis tengdar at samanleggingini, sigur Árni Joensen, stjóri á Skipafelagnum, í stuttari viðmerking. Hann leggur tó afturat, at flutningsvinnan mangan er turbulent og dynamisk, og tí kann tað vera torført at siga nakað nágreiniligt um framtíðarútlitini.